

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 12 - 2011

# Shell gevst í Sýrialandi

Nú ES hevur samtykt fleiri búskaparlig tiltøk ímóti Sýrialandi, hevur oljufelagið Shell gjørt av at gevast við sínum virksemi í landinum. Harafturímóti ætlar tað franska Total at halda fram. -Vit raðfesta trygdina hjá okkara starvsfólki fremst, og vit vóna, at umstøðurnar hjá sýriska fólkinum batna skjótt, sigur Shell í tíðindaskrivi. Sýriska felagið Al-Furat Petroleum Company, sum Shell arbeiðir saman við, er millum tey sýrisku feløgini, sum ES hevur sett á ein svartalista. Hinvegin er samstarvsfelagið hjá Total, Deir Ez Zor Petroleum, ikki á listanum. Shell fer tó ikki úr Sýrialandi beinanvegin, tí tað tekur tíð at leggja virksemið niður, sigur felagið.